## DAGSINS MEINING

# Valið

So er valið av, og ikki kann annað sigast enn, at valið var ein sigur fyri fólkaræðið, um hugsað verður um valluttøkuna. Valluttøkan var størri enn nakrantíð, og hetta kann bert merkja, at borgararnir taka lokala demokratiið í stórum álvara. Hetta er gott, og gott er tað eisini, at avgerðir veljarana yvirhøvur vóru sera greiðar. Hetta má einhvør ásanna, uttan mun til, um einum dámar úrslitið ella ikki.

Í gjár reistu vit spurningin, hvørt eitt føroyskt kommunuval kann nýtast sum eitt slag av veljarakanning ella ikki. Venda vit aftur til hendan spurning her, so er hann framvegis ógreiður. Taka vit t.d. valini í Vági og á Tvøroyri, so skuldu tey víst ávikavist misálit á Tjóðveldisflokkin og stórt álit á Javnaðarflokkin. Fara vit hinvegin til Havnar, so kann valið har tulkast sum ein álitisváttan til Tjóðveldisflokkin, sum er í andstøðu á løgtingi. Sama kann um Fólkaflokkin sigast, og hesin situr sum kunnugt í samgongu. Eitt annað dømi er Sambandsflokkurin, sum fór aftur í nøkrum býum, fyri síðan at hava stóra framgongd í øðrum býum sum t.d. á Tvøroyri.

Sostatt er tað sera ivasamt, hvørt bygda- og býráðsvalið yvirhøvur hevur nakað landspolitiskt signalvirði. Valið snúi seg fyrst og fremst um um lokalpolitikk og um leiklutin hjá lokala demokratinum. Tað er tó ikki óhugsandi, at landspolitikkarar fara at skeita eftir kommunalu valúrslitunum, tí tey eru veruliga sera áhugaverd í ávísum býum og serstakliga í teimum samanløgdu kommununum.

Nú er tann stóri spurningurin, hvussu valdsbýtið verður á teimum stóru plássunum. Her er einki givið uttan á Tvøroyri, á Sandi og í Skopun. Í Vági, í Klaksvík og í Tórshavn stendur hesin spurningur opin. Tað er lítið at ivast í, at Tjóðveldisflokkurin, sum hevði eitt framúr gott úrslit í Havn, fer at gera alt til tess at koma framat valdinum. Spurningurin er bert, hvønn prís flokkurin skal rinda, og her er nokk eingin ivi um, at Tjóðveldisflokkuirn má gloyma alt um borgmeistarapostin, um hann skal sleppa inn í varman. Tað er lítið sannlíkt, at stóri atkvøðuslúkur floksins letur sær lynda minni enn hetta starv. Sostatt er valið í Havn enn sera spennandi. Mest sannlíkt er tó, at gamla samgonga heldur fram møguliga styrkt við Javnaðarflokkinum. Tað hevði ivaleyst verið ein sterk og arbeiðsfør samgonga, sum hevði havt tann fyrimun, at hon varð hálað eitt sindur inn ímóti miðjuni.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Tak Lisbeth

**Leif Jacobsen,**
*folketingskandidat for Minoritetspartiet*

Jeg vil først rette en tak til Lisbeth L. Petersen for hendes hurtige reaktion, i forbindelse med de skattemæssige problemer, jeg kom ud for, da jeg flyttede til Danmark.

Sagen var nemlig den, at jeg i første halvår af 2003 havde tjent 29.000 kroner, mens jeg boede på Færøerne. I andet halvår tjente jeg 196.000 kroner. Da jeg flyttede til Danmark den 1.7.2003, mente skattevæsnet i Albertslund Kommune, at jeg skulle betale skat, som om jeg havde tjent 392.000 kroner og så dele dette beløb med 2, ifølge skattelovens § 14. Men det gav jo som resultat, at jeg skulle betale cirka 17.000 kroner mere, end hvis der havde været foretaget en skatteberegning af, hvad jeg virkelig havde tjent: 225.000 kroner (29.000 og 196.000).

På skattekontoret fik jeg først et forslag om, at jeg skulle betale 8.000 kroner i ekstra skat. Da jeg klagede over det, blev det nedsat til 3000 kroner. Så klagede jeg igen, og endnu engang blev min skat ændret, nu fik jeg 3.000 kroner tilbage. Men her kom så Lisbeth ind i billedet, som en frelsende engel, idet hun havde henvendt sig skatteministeriet, som kunne fortælle, at den 1.4.2004 trådte et EU-direktiv i kraft, og hermed blev skattelovens § 14 sat ud af kraft.

Nu skal skatteberegningen foretages ud fra, hvad man reelt har tjent, ligegyldigt om de er tjent på Færøerne eller i Danmark.

I første omgang påstod skatteforvaltningen i Albertslund, at loven ikke havde tilbagevirkende kraft. Men det er forkert, idet der i bemærkningerne står, at man kan få foretaget en ny vurdering af sin skat helt tilbage til 1998.

Det 4. og sidste forslag til skat for 2003 blev, at jeg har fået mere end 9.000 kroner tilbage. Altså en forskel på 17.000 kroner fra det første forslag til det fjerde forslag. Hvis jeg havde godtaget forslag 1, 2 eller 3, tvivler jeg på, at de af egen kraft havde henvendt sig til mig igen.

Derfor vil jeg opfordre alle, som har skiftet folkeregisteradresse mellem Danmark og Færøerne siden 1998 om at henvende sig til skattemyndigheden i Danmark. Jeg er nok ikke den eneste, der har haft dette problem.

Problemet for kommunerne i Danmark er, at de under det borgerlige styres skattestop, har svært ved at få enderne til at hænge sammen, og har derfor ikke andre muligheder, end at føre en stram politik overfor borgerne. Et tydeligt eksempel på dette er, at hver fjerde, der klager over ikke at have fået, hvad de mener at være berettiget til ifølge sociallovgivningen, får ret i, at de får for lidt udbetalt.

Endnu en gang: tak Lisbeth.

Til sidst, kan jeg ikke lade være med at komme med en kommentar til den religiøse genoplivning i forbindelse med det netop afholdte præsidentvalg i USA og kommunevalget her på Færøerne.

Vil vi virkelig leve efter Luthers lære, hvis samfundsopfattelse ser mennesket, som et »farligt rovdyr«, som skal holdes i lænker, og som passivt skal affinde sig med og underlægge sig enhver myndighed, uanset hvor uretfærdig denne måtte synes - fordi myndighederne ses som Guds »tugtemestre og bødler«.

Nej heldigvis ikke. Kræv din ret og tro på dig selv.

# Evnisdagur um fosturtøku

**TÍÐINDASKRIV FRÁ FØROYAR PRO VITA**

Aftur í ár skipar Føroya Pro Vita fyri evnisdegi, har ymisk evnir viðvíkjandi fosturtøku verða viðgjørd og lýst meira nágreiniliga.

Hetta er ein einastandandi møguleiki hjá øllum sum hava áhugað í fosturtøkuspurninginum, at fáa meira at vita. Evnisdagurin er viðkomandi fyri polittikarar, lógarsmiðir, starvsfólk innan heilsuverkið, mammir, pápar, prestar, samkomuleiðarar, tíðindafólk og fólk sum hava verið við í kjakinum.

Í kjalarvørrinum av fosturtøkukjakinum í seinastuni, hevur Pro Vita valt at lýsa avleiðingarnar sum standast av fosturtøku. Avleiðingarnir av fosturtøku hava ikki verið frammi í kjakinum, og til at lýsa hetta evni nærri, fara hjúnini, Elisabeth og Carl Sukkot frá Tilflugten í DK, at halda tveir fyrilestrar undir heitinum:

– Hví fáa nakrar kvinnur sálarligar trupuleikar av fosturtøku, og aðrar ikki ?

– Hvørja ávirkan hevur fosturtøka á familjuna ?

Evnisdagurin verður hildin í Útvarpshøllini leygardagin 13. nov. Byrja verður kl. 10.00 við morgunkaffi.

Evnisdagurin er almennur og ókeypis.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Avbera gott kvinnuval í Havnini

**Býráðsvalið týsdagin hevði nakað av útskifting við sær. Serliga merkisvert var kanska, at tríggir mans vórðu útskiftir við tríggjar kvinnur. Heldur óvæntað verða nevniliga ikki færri enn seks av trettan býrðáslimum, kvinnur**

**VALIÐ 04**
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

**Annika Olsen**
Fólkaflokkurin, sum hevur gjørt rættiliga nógv fyri at profilera Anniku Olsen, fekk eisini bonus fyri tað. Annika kom inn við 244 atkvøðum, og er sostatt nýggj í býráðnum. Seinasta valskeið sat Jákup Suni Joensen fyri Fólkaflokkin, men hann stillaði ikki uppaftur hesuferð. Annika Olsen tók, við sínum 244 atkvøðum, hansara sess.

**Beata L. Samuelsen**
Beata L. Samuelsen varð endurvald av sambandsveljarunum. Hon misti tríggjar atkvøður í mun til seinasta val, men hetta var kortini nóg mikið til at tryggja henni ein sess í býráðnum. Eina løtu hekk hon í einum klønum tráð, tí tað var óvist hvørt Sambandsflokkurin ella Javnaðarflokkurin fór at fáa tann triðja býráðssessin. Ì seinastu løtu fall hann til sambandið, og harvið varð Beata endurvald við 207 atkvøðum.

**Katrin og Elin**
Javnaðarflokkurin gjørdi eitt veruligt hál, reint kvinnupolitiskt. Javnaðarflokkurin vann sær tvey umboð á ting, og tað vísti seg at vera tvær kvinnur. Katrin Dahl Jacobsen, sum av álvara gjørdi eitt metstórt hál við 583 persónligum atkvøðum, var toppskorari av øllum teimum kvinnuligu valevnunum, og samanlagt gjørdist hon nr. 3, frammanfyri Jan Christiansen.

Elin Lindenskov var endurvald, hóast hon hevði eina stóra afturgongd í atkvøðum. Við seinasta val fekk hon knappar 400 atkvøður, meðan hon hesaferð fekk 238. Ein afturgongd uppá knappar 160 atkvøður, men tó nóg mikið til at koma inn.

**Hildur og Marin Katrina**
Tjóðveldisflokkurin fekk, kanska heldur óvæntað, stóra framgongd. Stóri vøksturin av atkvøðum gav úrslit, tí Tjóðveldið vann eitt umboð afturat. Hildur Eyðunsdóttir, sum eisini sat seinasta valskeið, varð endurvald við 288 atkvøðum í mun til 334 seinast. Ein lítil afturgongd uppá 46 atkvøður.

Ein av teimum, sum allarhelst hevur tikið nakrar av atkvøðunum frá Hildur, man ivaleyst vera nývalda Marin Katrina Frýdal, sum var beint í hølunum á Hildur, við 286 atkvøðum. Ógvuliga óvæntað, av eini higartil púra ókendari kvinnu í býaðspolitikki.

**Næstan helvtin**
Alt í alt má nú staðfestast, at tað sær út til, at tosið um at fáa fleiri kvinnur í politikk endiliga er farið at endurspeglast í kynsbýtinum á teimum valdu.

Við seks kvinnuligum umboðum av trettan, er hugsandi, at býráðspolitikkurin fer at verða broyttur eitt vet. Í valstríðnum hevur fleiri ferðir verið ført fram, býráðspolitikkurin er ógvuliga mannfólkadomineraður, tí so fáar kvinnur hava verið valdar, at tað hevur verið torført hjá teimum at gjørt sína ávirkan galdandi. Spennandi verður nú at síggja, um broyting kemur í. Hvørt valdu kvinnurnar fara at leggja dent á at standa saman um nøkur mál ella um tær einans fara at arbeiða partapolitiskt.

Marin Katrina Frýdal:

# Opinleiki og virðing

**Nývalda Marin Katrina Frýdal úr Tjóðveldisflokkinum heldur, at nógvu gølurnar, serliga í byggimálum, hava kostað fráfarnu samgonguni dýrt. – Og stríðið ímillum Tobba og Høgna fekk øvugta ávirkan á valið, enn frammanundan varð hildið, segði hon**



**VALIÐ 04**
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

Marin Katrina Frýdal er ikki nøkur kend kvinna innan býráðspolitikk. Men hóast tað er fyrstu ferð, at hon stillaði upp, slapp hon inn sum nummar fýra á tjóðveldislistanum. Hon hevði bert tvær atkvøður minni enn Hildur Eyðunsdóttir, sum kom inn sum nummar trý.

Sjálv heldur Marin Katrina Frýdal, at greinarnar, sum hon hevur skrivað hava gjørt størsta munin.

– Eg havi skrivað rættiliga nógv í seinastuni, og fólk hava sikkurt tikið undir við tí. Eg havi lagt stóran dent á at fáa opinleika og virðing inn í politikkin. Bæði ímillum politikararnar, men so sanniliga eisini mótvegis borgarunum, segði ein glað Marin Katrina Frýdal, beint eftir, at úrslitið var kunngjørt, og legði afturat, – Hóast eg búgvi í Havn, so eri eg av Velbastað, og har fekk eg eisini nógvar atkvøður. Tað gjørdi sítt til, at eg kom so høgt upp, segði hon.

**Rættlag á byggiætlanirnar**
Marin Katrina segði, at í framtíðini má skil fáast á byggiætlanirnar í kommununi.

– Tað hava verið gølur aftaná gølur, serliga í byggimálum, ímeðan undanfarna samgonga sat. Har varð hugsað ov lítið, tá bygt varð, og tað hevur allarhelst eisini kostað Sambandsflokkinum, sum gekk nógv aftur. Vit mugu avgjørt fáa rættlag á byggimál, staðfesti hon.

Spurd, um hon heldur at gølan í Tjóðveldisflokkinum hevði nakra ávirkan á valið, svaraði Marin Katrina, at tað jú vísti seg at verða júst tað øvugta av, hvat fólk væntaðu sær.

– Stóra stríðið var eitt persónsmál ímillum Tobba og Høgna. Tjóðveldisflokkurin er so ómetaliga nógv meiri enn tað, og tað veit veljarin eisini væl, segði Marin Katrina Frýdal. – Nú mugu vit bara vísa veljaranum, at vit eru álitið verd.

Hon segði seg tí vóna at sleppa í samgoguna.

– Um tú ikki situr í samgonguni, fært tú einki útrættað. Tað hevur tí alt at siga at koma í samgonguna, og persónliga eri eg tilreiðar at ofra borgarstjórasessin, um tað er tað sum skal til, fyri at koma í samgongguna, segði ein avgjørd Marin Katrina Frýdal at enda.

Katrin Dahl Jacobsen:

# Dygg álitisváttan

**Katrin Dahl Jacobsen, sum gjørdist akkurát ov stutt til løgtingsvalið, eftir at hava sitið á tingi í 6 ár, hevur nú fingið eina dygga álitisváttan frá veljarunum. Hon fekk nevniliga trið flestar persónligar atkvøður í Havnini**



**VALIÐ 04**
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Tað var ómetaliga spell at vit ikki fingu triðja umboðið eisini, tað manglaði so ómetaliga lítið í. So tað er eitt sindur ergriligt var fyrsta viðmerkingin frá Katrin Dahl Jacobsen, eftir valið.

Katrin segði víðari, at tað er ilt at siga, hvat hon hevði væntað sær undan valinum, tí fólk velja øðrvísi, tá tað er býráðsval.

– Men eg taki hetta í øllum førum sum eina dygga persónliga álitisváttan, og eg eri ógvuliga, ógvuliga fegin, segði Katrin Dahl Jacobsen, júst eftir, at persónligu atkvøðurnar vórðu kunngjørdar.

**Komandi valskeið**
– Eg havi hópin av tingum, sum eg nú ætli mær at fara at arbeiða við. Fyrst haldi eg, at vit mugu royna at leita eftir semjum, tí tað eru fleiri ting, sum allir flokkar eru samdir um. T.d. eldraøkið og ungdómurin í Havnini, sum hevur verið eitt sindur forsømdur. Og so havi eg eitt hjartamál, sum er skúlin, greiddi Katrin frá.

Hon segði, at hon, meðan samgongusamráðingarnar fara fram, ætlar sær at gera alt fyri at koma í samgonguna.

Spurd um hon hevur nakra ávísa nevnd, sum hon kundi hugsað sær at komið í, var svarið, at hon so at siga kundi hugsað sær at komið í hvørja nevnd, tað skuldi verið.

– Tað er so sera umráðandi at vera við í tí partinum, sum skal stýra. Tá tú situr í andstøðu er so lítið tú kanst gera, men eg ætli mær so í øllum førum at vísa nakað fyri allan tann dygga stuðulin, eg havi fingið. Nú fáa vit at síggja, hvussu samgongan skipar seg, men í verandi løtu haldi eg í øllum førum, at allir møguleikar eru opnir. Eg síggi í øllum førum ein góðan møguleika, at Javnaðarflokkurin verður boðin við til samráðingarnar í nátt, segði nývalda Katrin Dahl Jacobsen, beint eftir valið.